## Anna Katrina á Hvonn

Í kvøld spælir Anna Katrina Petersen trio á Hvonn. Afturat sær hevur Anna Katrina, ið sjálv syngur, Leivur Thomsen á guitar og Bjarka Meitel á bass. Stutt kann sigast, at hetta er millum allar bestu tónleikarar í landinum. Leivur og Anna Katrina eru bæði útlærd á Det Kongelige Musikkonservatorium í Keypmannahavn. Tað eru bert annahvørt tvey og trý ár síðan tey fluttu til Føroyar. Aðrenn tað búðu og arbeiddu tey í Keypmannahavn. Leivur eigur heilt sikkurt krúnuna sum Føroya allar besti guitaristur. Bjarki er útlærdur á Berklee College of Music í Boston. Bjarki er m.a. kendur sum bassistur í bólkinum BrekkuBrothers. Tey spæla á Hvonn í kvøld kl 21.



# Almenn starvsfólk krevja lønarhækking

**Fleiri túsund starvsfólk, sum arbeiða hjá tí almenna, fara nú at krevja eina munandi lønarhækking fyri at vinna ógvusligu príshækkingarnar hesa seinastu tíðina, innaftur**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Nú skal álitið á Karsten Hansen standa sína roynd.

Tað staðfestir Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Sman við fýra øðrsum stórum fakfeløgum, fer Starvsmannafelagið nú at krevja lønarhækking og tí fara tey at boða Karsten Hansen til samráðingarborðið beint eftir summarfrítíðina.

Hini feløgini eru Lærarafelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Pedagogfelagið og Havnar Arbeiðsmannafelag og saman við Starvsmannafelagnum fara tey nú at orða nøkur felags krøv til landsstýrið.

### Rætt til samráðingar

Í 2006 breyt Starvsmannafelagið upp úr nýggjum við at gera ein fýra ára sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Hetta er fyrstu ferð, at so drúgvur sáttmáli verður gjørdur á almenna arbeiðsmarknaðinum og hann gongur sostatt ikki út fyrrenn tann 1. oktober 2010.

Tað gjørdi Starvsmannafelagið fyri at vísa samfelagssinni, sum tey søgdu og tí at tey mettu at tað hevði stóran týdning fyri allar partar at tryggja frið á arbeiðsmarknaðinum í eitt longri tíðarskeið enn tey tvey árini, sum eitt vanligt sáttmálaskeið er.

Men fyri at gardera seg, fekk Starvsmannafelagið ein ventil í sáttmálan, sum segði, at broytast viðurskiftini í samfelagnum, sum ávirka lønarlagið munandi, skal tað bera til at samráðast um lønina av nýggjum tann 1. oktober í ár.

Men tað stendur eisini, at hetta kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur.

Tó skal leggjast afturat, at frammanundan varð ein sáttmáli gjørdur við Føroya Arbeiðsgevarafelag um starvsfólk hjá Føroya Tele og hann var upp á trý ár og níggju mánaðir og har var eisini ein orðing um at endurskoðað lønina, henda munandi broytingar.

Síðani hava eisini onnur feløg fingið somu orðing, sum gevur teimum rætt til nýggjar samráðingar mitt í sáttmálaskeiðnum.

### Karsten standa sína roynd

Og Selma Ellingsgaard sigur, at tað kunnu ikki vera fleiri meiningar um, at fortreytirnar fyri sáttmálanum eru munandi broyttar við nógv hækkandi prísum á bæði olju, mati og bústaði.

Tí fer Starvsmannafelagið, saman við hinum feløgunum nú at krevja meiri í løn og ætlanin er, at samráðingarnar við Fíggjarmálaráðið skulu byrja beint eftir summarfrítíðina.

Og forkvinnan í Starvsmannafelagnum staðfestir, at nú skal álitið á Karsten Hansen standa sína roynd.

- Nú fáa vit at prógv fyri um Fíggjarmálaráðið veruliga meinar nakað við tað, sum stendur í sáttmálanum.

Men hon staðfestir eisini, at vísir tað seg, at lyftini frá fíggjarmálaráðnum í sáttmálanum bara eru tóm orð, fer hetta uttan nakran sum helst iva at fáa stórar avleiðingar við sær til næstu reglugligu samráðingar í 2010.

-Fáa vit ikki lønarhækking nú, verður ongin ivi um, at krøvini vera bara so mikið størri í 2010. Og tað er samstundis greitt, at vit fara aldrin at góðtaka at gera ein so drúgvan sáttmála aftur.

- Men vit ivast ikki í, at fíggjarmálaráðið ætlar at halda orð og nú eru viðurskiftini broytt so nógv, at vit hava krav upp á eina serliga lønarhækking nú, leggur hon afturat.



*Forkvinnan í Starvsmannafelagnum sigur, at nú skal álitið á Karsten Hansen standa sína roynd*

### Munandi lønarhækking

Hvussu stóra lønarhækking, tey fimm fakfeløgini fara at krevja, fáa tey ikki sagt so nógv um enn, tí tað er nakað, sum tey fara at rokna seg fram til í summar.

- Men tað er greitt, at talan skal verða um eina hækking, sum munar, tí prísirnir eru farnir nógv upp hesi bæði seinastu árini.

Í hesum sambandi kann upplýsast, at á heysti í 2006, tá ið sáttmálin kom í gildi, var prístalið 106,5 stig, men nú er tað næstan 113,9 stig.

Sostatt eru prísirnir hækkaðir 6,4 prosentstig hesi bæði árini.

Samstundis hava lønarhækkingarnar ligið um 3% um árið. Men ein partur av tí er eftirløn, sum løntakara ikki fáa atgongd til, fyrrenn teir fara frá fyri aldur.

- Eftirlønina fáa vit ikki keypt fyri nú og sostatt er veruliga lønarhækkingin ikki meiri enn góð 2% um árið. Sostatt er tað greitt, at lønirnar eru afturúrsigldar hesi bæði árini og at keypiorkan er fallin.

Hon vísir eisini til, at í grannalondum okkara eru sáttmálar akkurát nú gjørdir við eini lønarhækking, upp á eini 4,5% um árið.

Sum tað sæst á hinari greinini her á síðuni, er ætlanin at fleiri fakfeløg at ganga saman í samstarv í samráðingum við Landsstýrið og fyrsta royndin verður í heyst.

# Fakfeløg royna at trekkja tenninar úr landsstýrinum

**Fleiri fakfeløg, sum hava fólk í starvi hjá tí almenna, fara nú at gera ein felagsskap, sum skal styrkja tey í samráðingum við landsstýrið. Fyrsta royndin skal standa longu nú í heyst**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Viðhvørt kann tað vera ov lætt hjá landsstýrinum at seta kílar í ímillum tey ymsu fakfeløgini.

Tað heldur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Men tað fara fakfeløgini nú at royna at gera nakað við.

Ì eini roynd at styrkja seg og samstundis trekkja tenninar úr landsstýrinum, arbeiða fleiri fakfelag, sum hava fólk í starvi hjá tí almenna, nú við at gera ein felagsskap, so at tey kunnu gera felags front ímóti landsstýrinum, tá ið samráðingar verða.

Forkvinnan í Starvsmannafelagnum sigur, at tað eru heili 32 fakfeløg, sum hava lønarsáttmála við landsstýrið og tey eru ógvuliga ymisk í støðd, frá nøkrum heilt fáum limum, til Starvsmannafelagið, sum hevur fleiri túsund limir.

- At vit eru so mong og so spjødd, gevur landsstýrinum ov lætt spæl at seta okkum upp ímóti hvørjum øðrum, staðfestir Selma Ellingsgaard.

- Hvussu nógv fakfeløg vera við í tí felags samstarvinum, dugir hon ikki at siga enn, tí tað vil tíðin vísa.

Men í fyrstu atløgu eru tað tey fimm stóru fakfeløgini, sum samráðast um at gera ein felagsskap og tey eru Starvsmannafelagið, Lærarafelagið, Pedagogfelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Hon sigur, at enn eru samráðingarnar á byrjanarstigi og tí dugir hon enn ikki at meta um, hvussu umfatandi samstarvið verður.

### Sveinaroyndin í heyst

Sum tað sæst á hinari greinini her á síðuni, fer Starvsmannafelagið nú at biðja fíggjarmálaráðið um samráðingar fyri at hækka lønina.

Tað fer felagið vísandi til eina orðing í sáttmálanum, sum sigur, at um munandi broytingar eru í samfelagnum, skal tað bera til at samráðast um lønina av nýggjum.

Lærarafelagið og Pedagogfelagið hava somu orðing í sáttmálanum, men tað hava sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki og Havnar Arbeiðskvinnufelag helst heldur ikki.

Men Selma Ellingsgaard sigur, at øll fimm feløgini fara nú at orða nøkur felags krøv til Landsstýrið til samráðingarnar í oktober.

Men tann stóri spurningurin er, hvussu Fíggarmálaráðið fer at taka ímóti krøvum frá feløgunum, sum ikki hava krav upp á samráðingar nú.

- Tað vita vit ikki, men tað skal standa sína roynd, men vit vóna, at tá ið summi feløg fáa lønarhækking, fer tað eisini at dryppa á hini feløgini.